DAGSINS MEINING

Málið má ikki køvast í samgonguroki

Álvarsmálið um landsantikvarin er langt frá liðugt og má ansast eftir, at málið ikki verður gloymt í øllum samgongurokinum. Landsstýriskvinnan bar seg skeivt at og tók avleiðingarnar. Hetta átti at verið ógvuliga einfalt at fata, hóast Tjóðveldisflokkurin av roynir at fáa tað at síggja út sum, at alt fór rætt fram í málinum. So langt so gott. Eftir stendur, at feilurin ikki er rættaður. Setanarpolitikkur og siðvenja eru ikki fylgd. Einstaklingurin, ið var innstillaður og funnin ov lættur, og fakfelagið royna at fáa tingini í rættlag aftur. Hetta málið eigur ikki at tengjast saman við keglið millum Tjóðveldisflokkin og løgmann. Tað áliggur politiska myndugleikanum at fáa hetta mál loyst.

Hitt málið, um ringa gongulag samgongunnar, er nógv meira einfalt enn. Tjóðveldisflokkurin og Fólka-flokkurin eru grundleggjandi ósamdir um flestu týðandi mál. Vit kunnu bert hyggja at fiskivinnupolitikkinum. Fullveldismálið er nú komið í eina heimastýrislegu, sum sjálvt Sambandsflokkurin kann stuðla.

»Ongantíð fyrr er so nógv gjørt á sjálvstýrisleið«. Hetta hoyrdist mangan uppundir seinasta val. Hvat er komið av skafti hjá samgonguni nú í fimm ár? Hevur samgongan yvirtikið meir enn aðrar samgongur? Nei! Er nøkur fólkaatkvøða hildin? Nei! Gamaní var blokkurin niðurskorin við einari ov stórari upphædd, men tað, at tað verður svangligari í Føroyum uttan økta ábyrgd av málsøkjum er ikki framstig á sjálvstýrisleið. Heldur tvørturímóti.

Undanfarna samgonga yvirtók Skipasýnið og skal hon hava rós fyri tað, men helst má tað søguligani sæð verða ein av soltnastu samgongum, tá um yvirtøkur ræður. Hví tvíheldur Tjóðveldisflokkurin so um Fólkaflokkin?

Ofta hoyrist, at Javnaðarflokkurin er so afturhaldssinnaður. Men hvør hevur verið størsti yvirtøkuflokkurin. Vit kunnu nevna Postverkið, Vaktar- og Bjarging-artænastuna, víðkanina av fiskimarkinum, avtøkuna av refusiónsskipanini, yvirtøkan av ráevnunum í undirgrundini. Øll vóru yvirtikin av samgongum undir javnaðarleiðslu. Tann løgmaður, ið hevur staðið á odda fyri flestu yvirtøkum í Føroyum, eitur Atli P Dam. Tjóðveldisflokkurin var við í hesum samgongum, og hevur mangan hug til at taka heiðurin av hesum yvirtøkum, men seinastu fimm árini hava víst, at flokkurin ikki formáar sær nakað á sjálvstýrisleið uttan Javnaðarflokkin. Nær hetta faktum fer at rína við yngra ættarliðið í Tjóðveldisflokkinum er ilt at siga. Kanska núverandi samgongustøða blæsir eitt sindur av søguligum innliti inn í hølini hjá Tjóðveldisflokkinum á Gamla Apoteki, soleiðis at pástandurin um, at »alternativið er svart samband« verður endurskoðaður. Alternativið er yvirtøkur við skili í einari arbeiðsførari samgongu við samhaldsføstum hugsjónum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Misljóð millum pensjónistar

Ditleif Eldevig
og vegna eina fullsamda nevnd í Eldrafelagnum Borgini í hesum máli

Tað er rætt, sum sagt er í yvirskriftini í Sosialinum í gjár 6. mars, »Tað er misljóð millum pensjónistarnar«. Vit mugu bara staðfesta:

- at feløgini ongan roknskap hava fingið frá landsfelagnum 2001 (uttan tann ið stóð í Sólsetur)
- at eignin fundarfrágreiðing er komin til limafeløgini
- at viðtøkurnar, sum komu í gildi 18. mai 2002, ikki eru fylgdar
- at Eldrafelagið Borgini verður noktaður almennur stuðul, sum landsfelagið umsitur
- at Tómas Tómasson, formaður landsfelagsins vil ikki boða Eldrafelagnum Borgini til fundar, vegna tess, at hann væntar bert illstøðu av Ditleif Eldevig
- at Tómas Tómasson sigur, »at grein trý sigur, at felag, sum ikki heldur viðtøkur Landsfelagsins, kann koyrast úr felagnum. Okkara viðm., at vit hava hildið viðtøkur landsfelagsins. Sí viðtøkurnar. Grein 3 sigur »Roknskap ella limalista«! Limalisti er innsendur. Men Eldrafelagið Borgin vil ikki finna seg í, at roknskapurin skal **góðkennast**, og tað er júst tað málið snýr seg um.

Vit hava:

- Eina nevnd, sum góðtekur roknskap okkara
- Grannskoðarar, sum grannskoða okkara roknskap
- Ein aðalfund, sum er hægsta vald felagsins, sum endaliga skal góðkenna roknskapin.

Eingin landsnevnd skal góðtaka ella góðkenna okkara roksnkap.

Tómas Tómasson, sum hevur verið limur í okkara felag og hevur bæði fingið roknskap og broyttar viðtøkur, sum ikki eru í stríð við viðtøkur landsfelagsins.

Sama hava eisini hini tvey, sum umboða landsfelagið, Símun P. Poulsen og Jacobina í Lambanum. Øll landsnevndin hevur verið limir í Eldrafelagnum Borgini – uttan at hava mótmælt.

Símun Pauli Poulsen og Jacobina í Lambanum eru framvegis limir í okkara felag. Og eru tey sjálvsagt vælkomin og kærkomin til framvegis at verða tað, her vit øll arbeiða í sátt og semju í einum mennandi og uppbyggjandi felagsskapi.

Vit kunnu framvegis ávísa, at viðtøkur og mannagongdir í landsfelagnum ikki verða fylgdar.

Vit kunnu eisini staðfesta, at uppskot okkara verða »koyrd í skrell«, sambært formanninum í landsfelagnum.

Ikki øll fáa orðið á landsfelagsfundum. Einki verður skrivað, okkum vitandi – vit hava ongar fundarfrásagnir.

Lógir og reglur felagsins hava ikki verið fylgdar, tá tað snýr seg um atkvøðugreiðslu á aðalfundi.

Hetta er okkara nevnd full samd um, og vit kunnu eisini staðfesta, at so er.

Í roknskaparárinum 2001 fingu limafeløgini ongan pening av tí almennu játtanini.

Misnøgdin hevur verið, og er stór millum limafeløgini, um hesa støðu og øll limafeløgini mugu nú bara staðfesta, at rætturin hjá nevndunum í limafeløgunum er frátikin teimum. Og at nú hava bert limirnir í teim ymisku lokalfeløgunum atkvøðurætt, um tey koma á fund. Her er talan um limir – **ikki nevndarlimir**. Rætturin til fulltrú er eisini tikin frá øllum lokal-limunum. Einans tey, ið møta til aðalfund í Havn, hava atkvøðu (umleið 100 av umleið 1000 limum). Hetta er júst tað vit hava mótmælt og tí ikki undirskriva viðtøkurnar og sum vit nú eru leys av, í og við, at vit ikki hava bundið okkum, meðan øll hini 13 limafeløgini eru niðurbundin.

Hesa støðu hava tey 13 limafeløgini góðtikið, og tað mugu tey so bara liva við.

Vit fáa einki gjørt við hetta. Og vit hava heldur einki ímóti at lata inn roknskap og viðtøkur, til kunningar, men nokta fyri at lata roknskap inn til góðkenningar. Kann landsfelagið ávísa, at okkara viðtøkur stríða móti viðtøkum landsfelagsins, er landsfelagið vælkomið til at ávísa tað, og vit vilja sjálvandi broyta tað, um so er.

Tómas, Símun Pauli og Jacobina hava jú roknskap og viðtøkur hjá Eldafelagnum Borgini.

Til seinast skal eg boða frá, at eg ikki møti upp til landsfelagsfund og heldur ikki til felagsnevndarfund hjá landsfelagnum – sum eg segði - og meinti.

Hann skrivar: *»Serliga Finnbogi legði áherðslu á, at tingfólk og serliga landsstýrisfólk okkara vóru ov ung og óroynd.«*

Nú er tað ikki greitt, hvat orðið »okkara« stendur fyri. Men Abraham Mikladal er eins og eg tjóðveldismaður, og tí kann tað skiljast soleiðis, at eg serliga havi umrøtt tingmenn og landsstýrismenn Tjóðveldisfloksins. Tað gjørdi eg ikki. Eg meinti líka nógv við aðrar flokkar.

So er tað hin parturin: *»ung og óroynd«.* Her roynir greinskrivarin heilt greitt at seta kílar millum ættarliðini, millum tey ungu og tey eldru. Rættleiðingin er, at eg nevndi ikki orðið »ung« eina ein-astu ferð - og meinti heldur ikki við tey ungu. Er tað nakar, sum halda, at eg segði nakað annað enn tað, sum eg

Rættleiðing til villleiðing

Finnbogi Ísakson

Týskvøldið skiftu Jógvan Sundstein og eg orð í Sjónvarpinum um politisku støðuna og politisku gongdina tey seinastu árini. Fólk hava yvirhøvur reagerað positivt uppá tað, vit førdu fram.

Tó ikki Abraham Mikladal. Í grein í Dimmalætting og Sosialinum roynir hann at reingja tað, sum varð sagt. Hann vil hava fólk at

Framhald á síðu 11

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Viðmerking til Palla Jacobsen

Við róðrarkvøðu
Jóhannes Joensen, formaður í RSF

Í Sosialinum, týsdagin 4. mars, hevur mín góði vinur, Palli Jacobsen, eina viðmerking undir yvirskrivtini: "Jarnbardur til Scillyoyggjarnar?". Palli spyr í stuttum og greiðum orðum, um tað yvirhøvur er rætt at lata Jarnbard umboða Føroyar í Sillyoyggjum í ár, tí nógvar av vinnandi manningini í fjør eru ikki við longur. Heldur skuldi annar bátur sloppið av stað, og tað skuldi verið tann, sum hevði bestu somu manning sum í fjør, (í hesum føri Smyril í Vági). Sjálvt um vit í RSF hava tann sið, at vit helst ikki leggja okkum út í blaðkjak, skal eg tó svara spurningunum hjá Palla, so at eingin ivi skal taka seg upp um hetta mál, eins og eg skal koma við nøkrum upplýsingum um sillykappingina sum heild. Lat meg tí fyrst í stuttum siga, hvussu kappingin er ikomin og skipað.

Tað var av fyrstan tíð oljufelagið Amerada Hess, sum tók stig til hennara, tá við tað beyð besta tíggjumannafarinum at royna seg í Sillyoyggjum. Felagið skipaði sjálvt fyri bæði kapping og ferð, og til gagns fyri føroyskan kappróður er Amerada Hess framvegis høvuðsstuðul og hornasteinur undir kappingini. Tá ið Róðrarsambandið eftir avtalu við oljufelagið fór at skipa fyri kappingini, varð hon broytt, soleiðis at allar manningar uttan fimmmannafør við dreingjum skuldu kappast um kjansin. Fyrstu árini dystaðust kvinnur og menn fyri seg, men av tí at tað gjørdist ov dýrt við tveimum manningum, varð avrátt, at besti bátur skuldi vinna sillykappingina. Samstundis varð gjørd reglugerð, sum segði, at var ikki øll tann vinnandi manningin tøk, skuldi báturin skaffa sær fólk av báti nr. 2, og um tað ikki bar til, so av báti nr. 3 o.s.fr. Henda reglugerð skuldi forðað fyri, at vinir og kenningar vóru tiknir við, heldur enn tey kappróðrarfólk, sum hava kappast um plássið. (Lagt kann verða afturat, at manningin má vera av sama kyni, tí í Sillyoyggjum er sum hjá okkum, at menn og kvinnur rógva ikki saman.)

Lat meg so venda aftur til Palla. Tað er rætt, at øll tann vinnandi manningin á Jarnbardi er ikki tøk til sillyferðina í ár. (Tríggjar eru tøkar, og at tað bert skal vera ein, man vera ein misskiljing). Tí hevur Jarnbardur, soleiðis sum reglugerðin sigur, vent sær til næstu bátarnar á listanum og hevur skaffað sær fólk av Páll Fanga, Riddaranum og Gongurólvi. Meir er ikki at siga um tað.

Eg eri onga løtu í iva um, at Smyril hevði verið góð umboðan at sent til Sillyoyggjar; men tað er nú eina ferð so, at Jarnbardur vann, og tískil fer Jarnbardur av stað. Her skal verða lagt afturat, at tær hava vant sera miðvíst síðan oktobermánað, og mangt eitt kvøldið havi eg staðið og eygleitt hesar kvinnur og verið hugtikin av teirra øgiliga vilja, tá tær í kavaroki, vindi, glaðustroki, myrkri og oysandi regni hava ligið úti á vágni og vant. Tað mundu verið mangir menn, teirra millum tú og eg Palli, sum høvdu aftrað seg við at sett seg við árarnar í slíkum umstøðum á vetrardegi. Tað hevði eftir mínum tykki verið skeivt at tikið heiðurin frá teimum. So svar mítt, Palli Jacobsen, er, at sjálvandi er tað rætt at lata Jarnbard umboða Føroyar í Sillyoyggjum í ár!

Tað er tó eyðvitað bæði gott og neyðugt at kjakast um málið. Tað er t.d. ikki óhugsandi, at reglugerðin fyri, hvussu vinnandi báturin skal verða mannaður, verður broytt komandi ár. Alt hetta er tó sjálvandi treytað av, at Amerada Hess framvegis við sínum góða hjarta stuðlar kappingini.

Hví ST-staðfesta sjálvsavgerðarrættin?

Kristina Háfoss
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin

Hetta er ein spurningur, ið nógv óivað seta sær. Grundgevingin tykist at verða, at "danska stjórnin hevur jú boðað frá, at vit kunnu taka fullveldi um vit ynskja hetta - er hetta ikki at hava sjálvsavgerðrætt?". Svarið er nei - als ikki. Tað at danskir myndugleikar ikki vilja viðurkenna føroyingar sum tjóð við sjálvsavgerðarrætti og tað, at føroyskir myndugleikar ikki hava fingið altjóða viðurkent hesi rættindi, hevur nógv størri týdning enn fólk flest geva sær far um.

Heimastýrið - ein sáttmáli millum tjóðir

Meðan flestu føroyingar síggja heimastýrisavtaluna sum ein sáttmála millum tvær tjóðir - sær danska stjórnin hesa avtalu sum eina fólkatingslóg. Danska stjórnin er ikki av tí fatan at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti og metir tí ikki, at føroyingar av sínum eintingum kunnu velja tað ríkisrættarligu kós, ið ynskt verður. Danskir myndugleikar er av tí fatan, at tað bert er við teirra samtykki, at føroyingar kunnu broyta ríkisrættarliga støðuna. Og júst hetta er sera grundleggjandi.

Skulu danir ella ES avgera ríkisrættarligu støðu Føroya ?

Frá sjónarhorninum hjá donskum myndugleikum eru tað fyrst og fremst sjónarmiðini hjá skiftandi donskum stjórnum, ið hava týdning og harnæst sjónarmiðini hjá føroyska fólkavalda løgtinginum. Hetta er ein sera ótrygg ríkisrættarlig og løgfrøðilig støða at verða í fyri føroyingar.

Við teimum broytingum, ið støðugt fara fram í heiminum kann nógv broytast eftir stuttari tíð. Tí kann støðan hjá donsku stjórnini mótvegis føroyskum myndugleikum eisini broytast. Og ikki er víst at hetta er til fyrimuns fyri føroyingar.

Hvussu fer ein broyting í løgfrøðiligu bindingunum millum Føroyar og Danmark at verða tulkað av donskum myndugleikum ?

Og hvar standa føroyingar eitt nú, tá danskir myndugleikar í næstum helst fara at siga frá sær øll fyrivarni mótvegis ES - og harvið lata fullveldi og avgerðarrætt eitt nú tá umræður um hvussu ríkisrættarliga støðan hjá Føroyum verður ávirkað av, at tað eru tey donsku sjónarmiðini, ið eru tey stýrandi. Undanfarna danska stjórnin við Poul Nyrup Rasmussen á odda metti ikki at føroyingar kundu yvirtaka málsøki, ið ikki vóru nevnd beinleiðis í heimastýrislógini frá 1948, eitt nú revsirættur, persóns, familju- og arvarættur, dómstólar og lóggáva um figgjarvirksemi og ognarrætt. Henda støðan broyttist tó eftir danska fólkatingsvalið, tá nýggj stjórn varð vald. Núverandi danska stjórnin er meira jalig viðvíkjandi yvirtøkum, men metir nýggja stjórnin tó, at tað eru danskir myndugleikar, ið skulu avgera hvat kann yvirtakast og hvussu.

Politiskar - ikki løgfrøðiligar forðingar

Sjónarmiðini og avgerðirnar hjá donsku stjórnunum eru reint politiskar og ikki løgfrøðisligar. Tí heimastýrislógin frá 1948 er ongin forðing fyri, at føroyingar kunnu yvirtaka øll málsøki og náa heilt at fullveldinum - um bert politiskur vilji er til staðar.

Heimastýrislógin staðfestir eisini at "Føroyar eru sjálvstýrandi tjóð" eins og føroyingar uppfylla allar treytir sambært fólkarættinum fyri at verða tjóð við sjálvsavgerðarrætti - og er tað tí ein politisk støða, ið danska stjórnin tekur, tá hon ikki vil viðurkenna at føroyingar eru tjóð við ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætti. Og hetta er ikki uttan orsøk.

Kundu velja millum framhaldandi ríkisstuðul og sjálvsavgerðarrætt

Tað var heldur ikki uttan orsøk at samráðingarnar við donsku stjórnina slitnaðu uppá júst henda spurning. Og als ikki uttan orsøk, at føroysku samráðingarfólkini við Løgmanni á odda, at enda fingu bjóðað fullveldisætlan við ríkisstuðli so leingi hetta varð neyðugt, um føroyingar bert vildu sleppa kravinum um viðurkenning og staðfesting av, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti.

"Ingen kompetence - uden bemyndigelse"

Somuleiðis var tað ikki uttan orsøk, at danski uttanríkismálaráðharrin Niels Helveg Petersen, í 2000 sendi soljóðandi skriv til ST: "Færøerne er en del af det danske kongerige, men har et vidtgående selvstyre med beføjelser hvad angår regulering af Færøernes indre anliggender. Hjemmestyret har ingen kompetence til at optræde på det folkeretlige plan, med mindre dette er bemyndiget af regeringen i overensstemmelse med hjemmestyreloven af 1948 og inden for rammerne af grundloven." Danska stjórnin hevur við hesum, og bæði áðrenn og síðan hetta hildið fast í, at føroyingar ikki eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Metur ikki at hetta er í samsvar við heimastýrislógina og grundlógina. Danski forsætismálaráðharrin hevur enntá gjørt tað greitt, at "í danska ríkinum er bert ein tjóð og tað er tann danska".

Samstundis er hetta fráboðað Sameindu Tjóðum skrivliga - og er hetta seinasta fráboðanin, ið ST hevur liggjandi, ið viðvíkir Føroyum.

Letur Føroya Løgting og Landsstýrið bara standa til er greitt, at hetta í altjóða høpi verður fatað sum ein óbeinleiðis viðurkenning av hesi støðu.

ST-staðfesting tryggjar rættindi og møguleikar

Ein altjóða staðfesting og viðurkenning av føroyingum sum tjóð við sjálvsavgerðarrætti vil eitt nú merkja, at danska stjórnin í altjóða høpi og eitt nú rætt til stuðul at fremja sjálvsavgerðarrættin, rætt til javnbjóðis fullveldissamráðingar uttan búskaparligar hóttanir og somuleiðis vil ein tílík staðfesting lata dyrnar upp fyri lima- ella atlimaskapum í ávísum altjóða felagsskapum, tryggja okkum ræðisrættin yvir føroyska tilfeinginum o.s.fr.

Av alstórum týdningi í hesum døgum er, at ein ST-staðfesting somuleiðis vil tryggja, at føroyingar varðveita sjálvsavgerðarrættin uttan mun til um Danmark letur stóran part av sínum fullveldi til ES.

Tað er tí ikki uttan orsøk, at danska stjórnin ikki vil viðurkenna at føroyingar eru tjóð - og als ikki uttan orsøk, at tað hevur størri týdning nú enn nakrantíð, at føroyskir myndugleikar tryggja sær, at føroyski sjálvsavgerðarrætturin verður altjóða viðurkendur og staðfestur.

Framhald av síðu 10

kennir til at vera ungur í politikki, so er tað eg, og eg styði fult út tey ungu, sum koma inn á ting ella í Landsstýrið.

Tað, sum eg førdi fram, var, at útskiftingin av persónum í føroyskum politikki hevur verið ov brá, og at kontinuiteturin tí ikki er nóg góður. At rudda alt út sum td í Italia fer ikki at geva eitt gott úrslit. Tað eru jú fyrst og fremst tey, sum hava gjørt mistøk, ið læra av teimum og kunna bera ta læruna víðari.

Hevði Abraham Mikladal gjørt sær ómak at kanna útskiftingina, so hevði hann sæð, at teir 21 tingmenninir, sum vóru valdir fyrstu ferð í 1994 ella 1998 ella 2002 vóru als ikki ungir allir. Teir flestu vóru á miðalaldri, tá teir vórðu valdir. Tað er galdandi bæði kvinnur og menn.

Tað nervar ikki meg, um Abraham Mikladal villleiðir fólk. Men eg haldi tað vera spell, at hvørt einasta sakligt upplegg til kjak verður traðkað undir heilt av greinskrivarum sum Abraham Mikladal.